## KÍ fær verjustyrk úr USA

Fyrrverandi ungdómslandsliðsspælari hjá USA og Trinidad & Tobago skal styrkja verjuna hjá KÍ í ár. 22 ára gamli Kareem Smith hevur seinastu trý árini verið fastur verjuspælari hjá amerikanska felagnum USF. Hann er í góðari dystarvenjing, tí sambært heimasíðu felagsins hevur hann ikki forsømt ein einasta minutt seinastu 56 dystirnar hjá felagnum. Hann hevur eisini spælt á U-20 landsliðnum hjá Trinidad & Tobago og spældi eisini á U-18 landsliðnum hjá USA.

Talan er um ein eitt ára sáttmála, og nýggi verjuspælarin kemur til Klaksvíkar fyrst í februar mánaða, skrivar heimasíðan hjá KÍ.

## Fyrrverandi Charlton-spælari til KÍ



24 ára gamli eingilsmaðurin Chris Cerroni skal spæla við KÍ í 2007. Hetta boðaði felagið frá um vikuskiftið. 24 ára gamli Chris Cerroni hevði í síni tíð lærlingasáttmála við Charlton. Honum eydnaðist ikki at vinna sær rættuligan sáttmála har, og síðani 2001 hevur hann spælt fótbólt í Florida, har hann sambært heimasíðuni hjá KÍ varð toppskjútti við 16 málum og varð kosins ársins spælari og ársins álopsspælari.

– Hann er uttan iva ein spælari, sum passar væl inn í hópin hjá okkum, og sjálvur eri eg sera væl nøgdur við avrikini, sum eg havi sæð hann vísa, sigur KÍ-venjarin Tony Paris úr Florida.

H71-VÍF 34-44 (18-24)

# VÍF vann stórsigur




*VÍF vann tryggan sigur í einum sera málríkum dysti, tá teir vitjaðu hjá H71 í Hoyvíkshøllini.*

**VÍF vann stórt í einum sera málríkum dysti, tá teir vitjaðu hjá H71 í Atlantic Airways deildini. Við sigrinum eru teir komnir aftur á rætta kós eftir tap síðsta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møttust í hoyvíkshøllini leygardagin, tá H71 tók ímóti oddaliðnum úr Vestmanna. H71 og VÍF hava møtt hvørjum øðrum tvær ferðir fyrr í grundspælinum, og í báðum førunum vann VÍF.

Fyrri dysturin, sum var í Hoyvík, endaði við einum 4 mála sigri til VÍF, meðan eingin ivi var í Vestmanna. Tá vann VÍF við heili 11 málum, so undan dystinum leygardagin var VÍF stórfavorittur.

### VÍF legði grundina

Fyrstu løtuna leikaði javnt á í Hoyvíkshøllini. Her hevði H71 kanska munin, men so við og við tók VÍF yvir. Um miðjan fyrra hálvleik tóku teir leiðsluna, men H71 fylgdi tó væl við, tí munurin var ongantíð meir enn 2 mál. Móti endanum fekk VÍF tó veruliga rist H71 av sær. Við 4 málum á rað øktu vestmenningar knappliga um munin upp í 6 mál, og nú sá ikki gott út hjá hoyvíkingum.

Vestmenningar kláraðu at halda leiðsluna allan vegin til hálvleiks, tí tá var munurin nevniliga eisini 6 mál.

### Sigurin var ongantíð í vanda

Eisini í seinna hálvleiki byrjaði H71 betur. Fyrstu løtuna fingu teir minka um munin niður í 4 mál, men nærri sluppu teir ikki. H71 royndi at hanga í, og teir stíddust eisini manniliga fyri at minka enn meir um munin. Um miðjan hálvleikin vóru enn 4 mál á muni, men so var liðugt fyri H71. Nú setti VÍF seg fullkomiliga á dystin.Næstu 5 minuttirnar fekk H71 einki mál, meðan VÍF skoraði 6 ferðir, og so var dysturin í roynd og veru avgjørdu. Nú vóru 10 mál á muni, og tað fóru hoyvíkingar ikki at vinna innaftur.

Síðstu løtuna slapp H71 tó at spæla við aftur, men munin fingu teir ikki minka meir um. VÍF vann nevniliga dystin við heili 10 málum, og við sigrinum eru teir komnir aftur á røttu kós eftir ósigurin í Kollafirði síðsta vikuskiftið.

### FAKTA

**H71–VÍF 34-44 (18-24)**
**Málskjúttar:**
**H71:** Halgir Dahl Olesen 10, Esbern Patursson 7 (2), Poul K. Dam 6, Tróndur Vatnhamar 4, Gunnar Bláberg 3, Janus Sørensen 2, Bjarni Sørensen 2,
**VÍF:** Agnar Joensen 12 (2), Sámal Joensen 9 (1), Ingi Olsen 8, Áki G. Olsen 5, Joen P. Høgnesen 4 (1), Harald Bjørgvin 2, Áki Olsn 1, Rúni Joensen 1, Regin Joensen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Brotskøst:** H71 3, VÍF 4
**Útvísingar:** H71 3, 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andrias F. Hansen

Fram-Mjølnir 1-3 (21-25, 25-20, 11-25, 20-25)

# Mjølnir vann toppdystin

**Mjølnir vann ein týdningarmiklan sigur í meistaradeildini hjá monnum, tá teir møttu Fram á útivølli. Við sigrinum hevur Mjølnir fyribils lagt seg á odda í bestu mansdeildini**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til ein spennandi dyst í Hoyvíkshøllini sunnudagin. Tá nummar 2 og nummar 3 í bestu mansdeildini í flogbólti brustu saman. Her tók Fram á 3. plássi ímóti Mjølnir á 2. plássi.

Um Fram skuldi gera sær nakrar vónir um at enda ímillum tvey tey ovastu, so skuldu teir vinna heimadystin ímóti Mjølnir, meðan Mjølnir eisini mátti vinna dystin fyri at hanga í ÍF á ovastu rók.

### Lítil munur fyrstu settini

Gestirnir úr Klaksvík fingu tó betru byrjanina uppá dystin. Fyrsta settið fylgdust liðini væl at, og munurin var ongantíð serliga stórur. Tó hevði Mjølnir hug at taka sær eina lítla leiðslu, og hesa leiðslu megnaðu teir at halda allan vegin. Teir vunnu nevniliga fyrsta sett 25-21, og sostatt høvdu teir nú fingið eina góða byrjan uppá týdningarmikla dystin.

Í 2. setti var tó vent í holuni. Nú var Fram knappliga oman á. Teir vunnið seg eitt sindur fram um Mjølnir, og so royndu teir at halda fast um leiðsluna. Hetta megnaðu teir eisini, og úrslitið í 2. setti gjørdist 25-20 til Fram.

### Mjølnir avgjørdi

Nú stóð aftur á púra jøvnum millum liðini, og munurin hevði heldur ikki verið serliga stórur fyrstu tvey settini.

Var eingin munur hesi bæði settini, so var hinvegin risastórur munur í 3. setti. Her blásti Mjølnir stutt og greitt Fram av vøllinum. Mjølnir vann seg fram um at kalla beinanvegin, og munurin gjørdist bara størri og størri. At enda vann Mjølnir ein knúsandi 25-11 sigur, og sostatt lógu teir nú væl fyri at vinna dystin.

Í 4. setti var Fram aftur betri við, men teir tóktist ikki heilt at koma seg eftir stóra tapið í 3. setti. Mjølnir vann seg nøkur stig fram um mitt í settinum, og hesa leiðsluna hildu teir.

4. settið endaði 25-20 til Mjølnir, og sostatt vunnu teir dystin 3-1. Við sigrinum hava klaksvíkingarnar fyribils lagt seg á odda í bestu mansdeildini. ÍF hevur tó leikt ein dyst færri, og í kvøld, mánakvøldið, skulu teir í dyst í Sørvági ímóti SÍ.



*Lítil munur var á liðunum fyrstu tvey settini, men í 3. og 4. setti vóru gestirnir væl betri. Serliga í 3. setti kom munurin millum liðini til sjóndar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*